Smábørn bíðaðu til fánýtis eftir bussi

Skótalívið er hart. Serstakliga, um ein ferðast við- Strandferðsluni og Bygdaleiðum, kundi ein skoytt uppí. Hetta staðfesti í hvussu er ein skótaleiðari um vikuskiftið, tá hann bíðaði longi á Drelnesi við 4 til 10 ára gomlum úlvungum

DAGFINN OLSEN

Tað gjørdist ein verulig skótaroynd hjá úlvungunum úr Vagi, tá teir skuldu vestur í Vágarnar um vikuskiftið at luttaka á skótalegu.

Leiðararnir høvdu boðað Strandferðsluni og Bygdaleiðum frá, at tey vóru ein bólkur, ið skuldi við, so tað skuldi alt verið í lagið. Tað var tað bert ikki.

Rúni í Lágabø, leiðari, sigur, at tá tey fóru úr Vági Fríggjadagin klokkan 13:30, var bert ein fullur busur til taks, men skótabólkurin passaði inn, men tey máttu standa uppi.

– Restin av ferðini gekk fínt, tað er bert her suðuri, at tað er galið, sigur Rúni í Lágabø.

Leygarkvøldið fóru úlvungar og leiðarar við Smyrli klokkan 20 úr Havn og hildu seg nærum vera heima, tá tey komu á Drelnes klokkan 22:15. Tey høvdu jú boðað frá, at tey sum bólkur komu. Hesi boð vóru bara ikki komin til Suðuroyar.

Bert ein lítil bussur stóð á bryggjuni og fleiri ferðaløg vóru við henda túr. Ungu úlvarnir og leiðararnir passaðu ikki við í bussin.

- Eg ringdi á Farstøðina í Havn, tí her suðuri er eingin, ið vit kunnu venda okkum til. Tað er alt í Havn. Eg fekk eitt mobiltelefon nummar. Har lovaði ein at senda boð eftir bussi. Hesin var ikki høviskur ella bað orsaka, og hann helt, at hetta kundi ikki hava so nógv uppá seg. Men bussur kom eingin, greiður Rúni í Lágabø frá.

Hjálp fekst sostatt ikki úr Havn hjá skótaleiðarunum, sum stóðu á Drelnesi klokkan 22:30 við 4 til 10 ára gomlum børnum.

Leiðararnir fingu tískil sjálvir bussføraran á lítla bussinum, at ringja til bussførara í Sumba. Hesin hevði frí, og helt til alla lukku eitt friðarligt vikuskifti, so hann hevði møguleika og stundir at koma á Drelnes, hóast langa teinin.

Rúni Í Lágabø leggur aftur-at, at Strandferðslan kundi um ikki annað givið boð, tí so kundu leiðararnir ringt til foreldrini at børnunum og biði tey komið eftir teimum.

Fartelfon bjargingin

– Eitt eldri par var eisini við hesa ferðina og sluppu heldur ikki við. Tey vitja javnan í Suðuroynni, men teirra ræðsla er at koma til Suðuroyar, tí slíkar hendingar eru ikki óvanligar. Eg hevði fartelefon og tað var heppi. Ein mynttelefon er á staðnum, men hon er innistongd. Tískil ringdi eg eftir einum hýrivogni til parið, so tey sluppu til hús, greiðir Rúni í Lágabø frá.

Hann sigur, at slíkar hendingar koma javnan fyri, eisini hjá øðrum ferðaløgum, ið ferðast í bólki, t.d. ítróttarfólki.

Eftir hendingina við bussinum, ið ikki kom fram, hava skótaleiðararnir hjá ungu úlvungunum prátað við stjóran á Strandferðsluni, Reidar Nónfjall, ið orsakaði hendingina og segði, at hetta mátti fáast í rættlag.

Menniskjasligt mistak

Tað eydnaðist ikki blaðnum at fáa orð á Reidar Nónfjall í gjár, men Dánjal Petur Lamhauge, ið hevur ábyrgdina av bussunum og sum var maðurin, sum skótaleiðararnir á Drelnesi fingu í telefonhornið leygarkvøldið, sigur, at talan var um samanfallandi misskiljingar og menniskjaslig mistøk.Hann váttar, at leiðararnir høvdu sent fax og boðað frá.

– Eg var staddur í Søldarfirði, tá tey ringdu. Eg ringdi til ein bussførara, sum ikki kundi fara avstað, men sum skuldi biða ein annan fara. Eg livdi so í hesi trúgv, sigur Dánjal Petur Lamhauge, ið ikki fekk gjørt stórt meira, tá skótaleiðararnir seinni ringdu og søgdu honum, at tey stóðu framvegis á Drelnesi.

Dánjal Petur Lamhauge sigur, at viðurskiftini eru sera trupul í Suðuroynni, tí bussarnir eru lítlir. Hann vil tó ikki vátta, at nakað ítøkiligt verður gjørt fyri at bøta um hetta.

Hann vísir hinvegin á, at ofta er neyðugt við smáum bussum, tí fleiri smáir tunlar eru í oynni, sum størri bussar ikki sleppa fígjøgnum.

Hann metir, at talan er um keðiligt mistak, men hevur ikki nøkur troystarorð til suðuroyingar, tí hann metir, at ringt verður at fyrbirgja slíkum hendingum í framtíðini.

Skótalívið er hart. Leygarkvøldið sluppu 4 til 10 ára gamlir úlvaungar ikki uppí bussin hjá Bygdaleiðum í Suðuroynni. Bussarnir í oynni eru ov smáir og orsøkin er mongu smáu tunnlarnir í oynni, sigur Strandferðslan

Andstøðan ósamd

Sambandsflokkurin metir tað vera púra beint at gera Postverkið til alment partafelag, meðan Javnaðarflokkurin hinvegin metir hetta vera púra burturvið

DAGFINN OLSEN

Nógv hevur verið frammi um framtíðarætlanirnar við Postverkinum, nú pengakassin brátt er tómur og peningur má finnas, skal Postverkið ikki steðga upp.

Men hvat heldur andstøðan um prátið um at gera Postverkið til alment partafelag?

Edmund Joensen, formaður Sambandsfloksins, heldur hetta vera tað einasta rætta.

– Í seinastu samgongu legði Ivan Johannesen lógaruppskot fram um at skipa Postverkið um til alment partafelag. Men hetta datt niðurfyri, tá val varð útskrivað, sigur Edmund Joensen.

Hann er tó framvegis vísur í, at hetta er rætta leiðin at ganga. Hann heldur, at støðan er einki broytt, men leggur afturat, at flokkurin hevur ikki viðgjørt hetta av nýggjum.

Edmund Joensen metir, at ein má laga seg til broyttar tíðir og viðurskifti. Hann vísir t.d. á skeivleikan í, at Postverkið legði leygardagin burturúr, tí onnur taka yvir virksemið, sum er slíkan dag, og tey taka aðrar uppgávur við sær eisini.

Edmund Joensen heldur, at samgongan er ikki før fyri at skera fígjøgnum og at hetta verður verri fyri hvønn dag sum gongur, tí Postverkið fær meira og meira at vinna inn aftur.

– Tað eru politikararnir, ið mugu taka støðu, tí leiðslan kann einki gera, vísir Edmund Joensen á.

Púra burturvið

Javnaðarflokkurin er ikki samdur við Sambandsflokkinum um framtíðarvánirnar hjá Postverkinum.

Kristian Magnussen úr Javnaðarflokkinum sigur seg ikki skilja, hvørjum tað skal tæna, at gera Postverkið til alment partafelag.

– Tað er púra burturvið. Tað kann millum annað føra til, at umstøðurnar hjá starvsfólkinum versna. Postverkið hevur samfelagsliga funktión. Rættast er at geva Postverkinum nóg mikið av peningi, so arbeiðið kann gerast, heldur Kristian Magnussen.

Hann minnir á, at spurningurin er ikki so einfaldur. Á mongum smærri plássum er posthúsið einasta almenna kontór

– Nú fáa fólk ikki eingang bløðini leygardag. Hvat er ætlanin. At spara og lata børn renna við postinum, spyr Kristian Magnussen, ið heldur tað vera ábyrgdarleyst av politikarum at lata Postverkið koyra seg í óføri.

Danir vunnu Grand Prix

Leygarkvøldið vunnu Olsen brøðurnir vegna Danmark Grand Prix sangkappingina 2000. Ikki síðani 1963 hava danir verið á odda og ikki øll vóru so vís í, at teir nakrantíð aftur fóru at koma á ovastu rók. Ummælarar fóru ikki væl við Olsen brøðrunum undan kappingini

DAGFINN OLSEN

Tá Jørgen og Noller Olsen vunnu Grand Prix leygarkvøldið, vóru tað als ikki tveir spáddir vinnarar, ið fegnir kundu syngja vinnaralagið Smuk som et stjerneskud.

Í 1963 vunnu Grethe og Jørgen Ingemann vegna Danmark við lagnum Dansevise. Síðani hevur verið misjavnt við eydnuni hjá dønum í prix sangkappingini og røddir hava verið frammi um, at danir áttu at tikið seg burturúr kappingini. Eisini hava ávísar broytingar verið, ið hava bent tann vegin.

Glaðir taparar

Ikki øll hava gott at bera dønsku luttøkni í Grand Prix seinnu árini og ummælarar eru ikki farnir væl við Olsen brøðrunum undan kappingini leygardagin.

Í Aktuelt leygardagin skrivar Sørine Gotfredsen grein, har hon heldur lítið um dønsku luttøkuna seinnu árini og heldur ikki væntaði hon sær stórvegis frá Olsen brøðrunum. Hon nevnir teir De glade tabere.

Hon metti í leygardags grein síni, at danir eiga at kenna stoltkeika, tá teir leygarkvøldið fara til botns í prix kappingini, tí hetta vísir, at danir hava valt við hjartanum og ikki lata seg stýra av vinnara útrokning ella trongd til at líkjast restini av Europa.

Við »Smuk som et stjerneskud« har Brødrene Olsen ikke alene skrevet en usangbar og charmerende umelodisk sang, der truer med at gå mumlende i stå, hver gang der ikke er noget omkvæd - de udgør også med deres midaldrende ansigter og hyggelige slidte stemmer lige præcis det par, man ville elske at få på besøg i sin kolonihave, sigur ummælarin.

Mett verður víðari í greinini, at hetta við ikki at vinna er júst tað, ið danir hava gjørt í áravís. Hon ivast tó í, um tað altíð er við vilja, at danir velja ein tapara at senda avstað, ella um tað til tíðir veruliga verður hildið, at nú er ein møguleiki.

Olsen brøðurnir vunnu leygarkvøldið Grand Prix sangkappingina 2000, hóast mong spáddu øðrvísi Mynd: Jens Kristian Vang

Gotfredsen heldur fram: Men her til lands lever den indre Olsen i allerbedste velgående, og i det øjeblik de to brødre i aften går på scenen i Stockholm og blinker hjem til os,, vil vi pludselig vide besked.

Så vil det stå klart, at vi igen har valgt med hjertet og intet andet, og at de to musikalske pædagoger - Jørgen og Noller - ikke vinder Grand Prix'et, og at det dybest set heller ikke var det, vi valgte dem til.

Vi valgte dem for deres grånende hår og nostalgiske værdi og for deres glade runde budskab - og vi valgte dem, fordi en ganske bestemt side af vores danske natur stadig i visse sammenhænge pludselig slår helt suverænt igennem.

Sólin sær á taparar

Olsen brøðurnir hava verið við í mong, mong ár. Báðir starvast teir innan skúla og mentan, og hava tónleikin framíhjá.

Eftir danska siðurin leygarkvøldið fegnast fjølmiðlarnir. Ekstrablaðið skrivar um Guderne Olsen og at teir báðir - midaldrende pædagoger - vórðu heiðraðir í Tivoli av fólki í túsundtal. Politiken metir vinnaralagið sum eitt stjørnuskot til eina milliard, um ein hugsar um marknaðarførslu av Danmark.

Óvantaður sigur?. Ja, kanska, men Danmark er aftur við í fremsturøð, hóast myrku og heldur niðurgerandi spádómarnar undan kappingini. Greiningurin í Aktuelt endar soleiðis:

Det bliver en lykkelig lørdag aften for Danmark, for vi vil komme til at sige godnat til Sverige med oprigtigheden og to rare brødre i behold.

Vi har nemlig ikke valgt at sende en taber til det internationale Melodi Grand Prix, fordi vi demonstrativt vil holde fast i os selv og vores særkende - vi vælger en taber, fordi vi hinsides musikalske ambitioner og påvirkning fra den store verden stadig af og til befinder os helt i hænderne på den glade indre Olsen.

I aften, når »Smuk som et stjerneskud« ryger direkte til bunds, vil vi tydeligere end længe forstå, at det er smukt at tabe, når man gør det, fordi man har valgt sig selv, og når natten sænker sig over Stockholm, vil vi tænke præcis, som Brødrene Olsen selv gjorde i deres store hit fra 1973:

For what we are, and what we'll be - the sun keeps shining on losers like you and me

Vi taber i aften, og vi gør det med glæde, for vi gør det som os selv.

Men tað skuldi ganga øðrvísi, enn ummælarin spáddi, og leygarkvøldið vann Danmark aftur Grand Prix á øðrum sinni. Fyrru ferð var í 1963.

Prestar sýta donskum bispum at prædika í Føroyum

Prestar í Christianskirkjuni og í Vesturkirkjuni sýta saman við kirkjuráðnum í Klaksvík fyri, at danskir biskupar sleppa at prædika í teimum báðum kirkjunum. Orsøkin er, at biskuparnir taka undir við samkyndum paralagi

JOHN JOHANNESSEN

Hvørki Karsten Nissen, biskupur í Viborg, ella Jan Lindhardt, biskupur í Roskilde, sleppa at prædika í ávikavist Christianskirkjuni ella Vesturkirkjuni annan Hvítusunnudag, eins og Føroya bispur hevði ætlað.

Hesum hava Bergur Debes Joensen, sóknarprestur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi, og stórur meiriluti av kirkjuráðnum í Klaksvík saman við sóknarprestunum, Niels Paula Danielsen og Hans Eileri Hammer syrgt fyri.

Orsøkin til, at dønsku biskuparnir ikki sleppa at prædika í Føroyum er, at teir 28. oktober 1997 skrivaðu undir eitt skriv, sum gevur loyvi til at boða frá samkyndum paralagi í kirkjuni.

Bert eitt tilboð

Dønsku prestarnir hava saman við øðrum norðurlendskum prestum fingið í boðið frá Hans Jacob Joensen, bispi, at prædika í Føroyum annan Hvítusunnudag í sambandi við, at teir eru við til hátíðarguðstænastuna fyri túsund ára haldið fyri kristniboðan Føroya.

Bispur sendi í mars sóknarprestunum kring landið skriv, har hann boðaði frá, at hann hevði boðið ávísum útlendskum bispum at prædika í ávísum føroyskum kirkjum. Í brævinum gjørdi bispur vart við, at sóknarprestarnir skuldu siga honum frá sum skjótast, bar tað ikki til at lata hesar bispar prædika.

Svar er síðani komið frá báðum prestunum í Klaksvík saman við kirkjuráðnum og frá Bergi Debes Joensen, sóknarpresti í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi. Hesi ynskja ikki, at fáa danskar biskupar, sum taka undir við samkyndum paralagi, at prædika í kirkjum sínum.

Føroya Bispur hevur tikið mótmælini til eftirtektar, og tí verður bert vanlig guðstænasta við vanligu sóknarprestunum í hesum báðum kirkjunum annan Hvítusunnudag. Bispur ger greitt, at talan var bert um eitt tilboð til kirkjurnar, og tá prestarnir ikki ynskja at taka av tilboðnum, tekur hann hetta til eftirtektar.

Skilir ikki hugburðin

Føroya Bispur er tó ikki fegin um mótmælini. Hann vísir á, at eitt er at vera ósamdur um ávísar lutir í trúarlívinum, men at tað er nakað annað at sýta starvsfeløgum at halda eina vanliga guðstænastu við vanligari prædiku.

– Tá eg sendi út tilboðið um at lata útlendsku biskuparnar prædika í Føroyum, roknaði eg als ikki við, at nakar trupulleiki fór at standast av hesum, sigur Hans Jacob Joensen.

Bispur vísir á, at hóast dønsku biskuparnir og føroysku prestarnir, ið hava sýtt teimum at prædika, eru grundleggjandi ósamdir, merkir hetta ikki, at prædikan, ið kemur frá dønsku biskupunum er verri enn tann frá føroysku prestunum.

Í hesum sambandi vísir bispur á, at Paulus í brævi til filippimanna sigur, at vit ikki eiga at leggja í, hvør prædikar, men hvat prædikað verður. Tað avgerandi er sambært bispi, at Kristus verður boðaður.

Stríðir móti samvitskuni

Bergur Debes Joensen, sóknarprestur, sigur seg kenna seg noyddan at mótmæla, at Jan Lindhardt prædikar í Vesturkirkjuni. Hann sigur, at Jan Lindhardt, sum ovasti myndugleiki fyri kirkjuna, hevur sett prestarnar og kirkjuna í eina sera ótolandi støðu.

– Geri eg ikki vart við, at eg eri ímóti hugburðinum hjá Lindhardt, røki eg ikki mína skyldu móti kirkjunar harra og hansara orði.

Bergur Debes Joensen vísir á, at hann í sínum prestaembæti fyrst og fremst skal vera trúgvur móti Guði og orði hansara. Tí tekur hann ikki undir við uppskotinum hjá bispi.

Kortini ásannar Bergur Debes Joensen, at prædikan, Lindhart hevði hildið annan Hvístsunnudag, helst hevði verið í lagi. Men tað, at maðurin, sum kirkjurnar hægsti myndugleiki, hevur gjørt greitt, at hann tekur undir við samkyndum paralagi og at hesi kunnu fáa kirkjuliga signing, heldur Bergur Debes Joensen vera nóg mikið til, at hann eigur at siga frá.

Hevur biskupurin loyvt sær at skriva undir áðurnevndu yvirlýsing, heldur Bergur seg eisini hava rætt til at siga frá síni hugsan.

– Spurningurin um samkynd paralag verður helst tikin upp aftur í føroysku kirkjuni. Tí er tað umráðandi at vera vakin og siga frá í góðari tíð, so vit ikki í Føroyum fáa líknandi signingar. Eg kann bara gera tað, sum eg kann, og tað er at at siga frá, og tað í góðari tíð, ger Bergur Debes Joensen greitt.

Tað eydanðist ikki Sosialinum at fáa viðmerkigar frá sóknarprestunum báðum í Klaksvík, Niels Paula Danielsen og Hans Eileri Hammer, til málið.





Bergur Debes Joensen hevur ikki samvitsku til at lata danskan biskup, ið tekur undir við samkyndum paralagi, prædika í Vesturkirkjuni

Mynd: Jens Kristian Vang

Pakkaferðir 2000 summarið www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
Danmark
DanCenter summarhús
1 vika í summarhúsi
Danland íbúðir
1 vika í frítíðarbúð
kr 6.263,-
kr 6.373,-
Noreg
Pers Hotel í Gol
1 vika í summarhúsi
kr 5.272,-
Hetland
Easter-houll Chalets
1 vika í summarhúsi
kr 5.952,-
Europa
Billerie í Weissenhäuser Strand í Norður-Týsklandi
1 vika á frítíðardepli
Fráferð: 19.05., 26.05., 02.06. ella 09.06.
kr 7.995,-
Ísland
Takkuferð
Key Hotellini
við 7 daga innivist á hotelli í dupultkamari
kr 4.033,- fyri hvønn
Sigl & Flúgv
Sigilt verður annan vegin og flogið hinvegin
Tórshavn - Hanstholm
og keypmannahavn - Vágar ella hinvegin
kr 2.445,- fyri hvønn
e-mail: booking@smyril-line.fo
• • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • •